Árni Ólafsson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini:

Nú má vinnan sjálv fylgja stevnuni upp

Arne Rosenkrands Larsen frá DONG var væl nøgdur við ráðstevnuna. Her er hann saman við formanninum í Føroya Oljuídnaði, Paula Einarsson

Jan Müller

Ein av teimum persónunum, sum var við oljuráðstevnuna í Norðurlandahúsinum í vikuni, var formaðurin í Oljuráðleggingarnevndini, Árni Ólafsson. Aftaná stevnuna spurdu vit hann, hvat hann hevði fingið burtur úr?

-Nú visti eg nógv longu frammanundan, tí hetta hevur ein arbeitt við nú í eina tíð. Sum formaður í Oljuráðleggingarnevndini fekk eg váttað, at tann uppfatan vit hava gjørt okkum av oljuvinnuni, t.v.s. tann máti hon arbeiðir og hugsar uppá, er á góðari leið.

Árni Ólafsson heldur, at tað var gagnligt, at vinnulívsfólk kundu fáa kunning um oljuvinnuna frá oljufeløgunum sjálvum og her eisini eina rættuliga realistiska kunning.

Serstakliga beit hann merki í, at tað kom rættuliga væl fram á ráðstevnuni, hvussu langa tíð eitt leitingarskeið kann taka og hvussu nógvar fyrireikingar skulu til - og at tað tí hevur skund at fáa lógarkarmin uppá pláss, so oljufeløgini vita, hvar tey flóta.

Árni Ólafsson vísir á, at leitingarskeiðið verður so mikið langt, at nógvir av teimum spurningum, sum fólk annars tosa um í dag, kunnu útgreinast í tí tíðarskeiðnum.

Tí hevur Oljuráðleggingarnevndin eisini roynt at skipa sítt arbeiði soleiðis, at ein leggur seg fyrst og fremst eftir at viðgera tað, sum skal til fyri at skapa ta varandi skipanina fyri eina rammulóg - og harnæst tær avgerðir, sum skulu takast undan fyrsta útbjóðingarumfarinum. Tá aðrar týðandi avgerðir skulu takast, tá sær verðin kanska heilt øðrvísi út.

-Ert tú bilsin av, at okkara politikarar brúka so nógva tíð uppá longu nú at tosa um, hvussu oljuinntøkurnar skulu brúkast?

Tað kann undra ein, at viðurskifti, sum liggja so nógv ár frammi í tíðini, skulu upptakast sum týdningarmiklari enn ting, sum liggja beint framman fyri nøsina á okkum.

Árni Ólafsson vísir á, at nú var málbólkurin til hesa ráðstevnuna vinnan, og tí roknar hann eisini við, at hon fylgir ráðstevnuni upp við at skipa fyri tiltøkum, sum hóska til hennara endamál.

Hann heldur tað vera eitt gott tiltak at skipa fyri slíkum ráðstevnum, tí tær eru bæði við til at økja um kunningina millum fólk og til at fáa hildið orðaskiftinum gangandi.

Gavin Hills-Jones, stjóri í Western:

Skilagott at hava dialog nú

Gerið tykkum ikki ov stórar vónir longu nú, tí tað er so tíðliga í útviklinginum. Verið realistisk. Men tað er skilagott av tykkum longu nú at umrøða oljumálið. Hetta er eisini fyrstu ferð eg havi upplivað ein dialog, áðrenn eina lisensrundu, sigur Gavin Hills-Jones frá felagnum WesternGeofysical

Gavin Hills-Jones, stjóri fyri nýggjum økjum hjá Western var við á Oljuráðstevnuni

-Sum seismiskt felag hava vit í Western arbeitt runt alla verðina. Men hetta er fyrstu ferð nakrastaðni í verðini, at eitt breitt og seriøst orðaskifti hevur tikið seg upp í einum nýggjum øki, so tíðliga í einum oljuútviklingi. Og hetta meti eg sum bæði skilagott og rætt.

Hetta sigur stjórin fyri nýggjum økjum hjá seismikkfelagnum Western, Gavin Hills-Jones, sum varð millum luttakararnar á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í farnu viku.

Hann er sera ovfarin av tí stóra áhuganum fyri ráðstevnuni og heldur fyri, at Amerada Hess bólkurin saman við Føroya Oljuídnaði hava gjørt eitt sera gott og professionelt arbeiði.

-Vónandi fer henda ráðstevnan at stimbra dialogin. Eg kann annars best vísa til orðini hjá Mike King frá Amerada Hess, har hann segði, at meðan teir koma við teknologini, so eiga føroyingar avgerðina um, hvat skal henda, og hvussu ein útviklingur skal skipast. Tí kann ein slík ráðstevna verða við til at byggja brýr millum føroyska samfelagið og ta vinnuna, sum skal troyta møguleikarnar.

Gavin Jones, sum hevur verið í Føroyum fleiri ferðir áður, nú Western hevur staðið fyri einum týðandi parti av tí seismiska arbeiðinum á føroyskum øki, heldur, at mong áhugaverd mál vórðu reist á ráðstevnuni. Hann heldur tað er rætt av føroyingum at geva gætur, at tað eru bæði vansar og fyrimunir við eini oljuvinnu, men tað tæður um at skipa so fyri, at fyrimunirnir verða fleiri enn vansarnir.

-Ofta er støðan tann, at tað verður farið at bora, og verður olja funnin, so eru stórir spurningar at taka støðu til. Av tí at tit eru so væl fyri longu nú, so hava tit møguleika fyri at stýra útviklinginum soleiðis, at tit ikki verða tikin á bóli.

Gavin Jones heldur, at oljuráðstevnan hevur kanska givið fólki eina fatan av, hvat henda vinnan snýr seg um.

Eg má endurtaka, at eg eri bæði bilsin og fegin um, at tit longu áðrenn eina lisensrundu og áðrenn tit vita, um nakar olja er her, hava fingið í lag eitt orðaskifti - ein dialog - bæði við oljufeløgini og innanhýsis hjá tykkum sjálvum. Her er so kunningin hjá eitt nú fjølmiðlunum av stórum týdningi.

Setið ikki vónirnar ov høgt

-Men, leggur Gavin Jones afturat. -Tað ringasta, sum kann henda, og sum eg berri otta fyri alla staðni, har vit arbeiða í nýggjum økjum, er, um tit skrúva vónirnar ov høgt upp - fyri so bráddliga at siggja, at har var einki at hava hetta í, og tað síðani endar við frustration.

Hann heldur, at júst tí at føroyingar longu nú hava fingið eitt orðaskifti um alt hetta nýggja, ber til at stýra útviklinginum og harvið eisini tryggja sær, at ein ikki setir sær vónir, sum einki hald er í.

Western var tað felagið, sum fekk litið upp í hendi stóru uppgávuna at skjóta seismikk yvir alt tað føroyska økið í 94 og 95. Í 96 hevur fyritøkan so aftur gjørt seismiskar kanningar fyri oljufeløg, eitt nú fyri Amerada Hess bólkin. Og aftur í ár ætlar Western sær at gera kanningar her.

Vit hava fingið nógv burtur úr og sjálvur má eg siga, at tað hevur verið gevandi fyri meg at koma at kenna føroyingar. Eg havi fingið eitt gott samstarv við fleiri fólk her, sum hevur nógv at siga fyri framtíðar virksemi okkara í hesum økinum, sigur Gavin Jones.

Innbjóðing

Í sambandi við at Bláí Krossur Føroya hevur latið upp skrivstovu á Glyvrum, vilja vit fegin bjóða limum, vinum og viðskiftafólki okkara at hyggja inn á gólvið í nýggju skrivstovu okkara á Glyvravegi á Glyvrum:

Mikudagin 12. mars 1997 millum kl. 14 og 18

Bláí Krossur Føroya

Glyvravegur · 625 Glyvrar

Tlf. 49343 · Fax 49353